

## Pedagogar og hjálparfólk [endurlýsing]

Dagstovnurin á Velbastað søkir eftir 4 pedagogum ella hjálparfólkum at byrja 6. august 2007 ella eftir nærri avtalu.

Á stovninum ganga í løtuni 55 børn í aldrinum frá einum til átta ár. Á stovninum eru størv leys bæði í vøggustovubólki, barnagarðsbólki og í Frítíðarskúlanum.

Møguleiki er fyri arbeiðstíð uppá 40, 35, 30 ella 20 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar verða settar eftir tørvinum hjá stovninum og eftir ynskjunum hjá starvsfólkunum.

Um pedagogar ikki søkja størvini, verða fólk við øðrum viðkomandi útbúgvingum og/ella royndum sett í størvini.

Stovninum tørvar fólk, sum hava áhuga fyri og evni til tónleik, sang, sjónleik, ítrótt og at brúka náttúruna.

Nýggi stovnurin hevur stóra høll og egnan bóltvøll og liggur beint við hagan oman fyri Velbastað.

**Løn og setanarviðurskifti**
annars verða sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at tosa við Bjarna Clementsen, leiðara á telefon 218132.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Dagstovnurin á Velbastað Norðuri á Heyggi 55 FO-176 Velbastaður í hendi seinast 12. juli 2007.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**



## Varaleiðari til Margarinfabrikkina

Søkt verður eftir varaleiðara at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 10. august 2007 ella eftir nærri avtalu.

**Vit bjóða tær**
- Eitt avbjóðandi og mennandi arbeiðsumhvørvi, har tú kanst seta tín dám á stovnin
- Møguleika fyri støðugari menning, bæði fakliga og persónliga
- Støðugt nýggjar upplivingar og nýggjar leiðir at ganga
- Ein góðan starvsfólkabólk, sum gevur pláss fyri og virðir ymiskleika

**Arbeiðið inniber**
- At arbeiða sjálvstøðugt og í ymiskum toymum
- At menna pedagogiska støðið á stovninum
- At røkja ávísar skrivstovuuppgávur
- At verða ein aktivur partur av leiðslutoyminum
- At samstarva við ymiskar stovnar og einstaklingar

**Vit vænta, at tú**
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag
- Hevur royndir at arbeiða við børnum og ungum
- Ert kreativ/ur
- Dugir væl at samstarva
- Hevur eitt positivt lívssýn, og sært møguleikar fram um forðingar
- Hevur virðing fyri ymiskleika
- Hevur teldukunnleika

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
Saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar Kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 9. juli 2007. Setanarsamrøðurnar verða hildnar í viku 30.

**Meira fæst at vita**
Um størvini við at venda sær til Alice Simonsen, stovnsleiðara á tlf. 213217.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

VESTMANNA KOMMUNA

## NÁMSFRØÐINGAR TIL DAGSTOVNIN GJÁARLON Í VESTMANNA

Søkt verður eftir 2 námsfrøðingum til Gjáarlon at byrja 01. 09. 07.

Talan er um fulltíðarstørv við møguleika at arbeiða niðursetta tíð . Størvini verða sett eftir avtalu.

Dagstovnurin er í 5 eindum við vøggustovu og barnagarði – normeraður til 84 børn.

Stovnurin letur upp kl. 7:15 og letur aftur kl.17.15.

Gjáarlon er ein grønur stovnur, sum leggur dent á at fara væl um umhvørvið – inni sum úti.

Umstøðurnar eru sera góðar – bæði innan og uttandura.

***Í tí dagliga arbeiðinum leggja vit dent á :***
- Trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum
- At skapa álit og tryggleika fyri børn og foreldur
- At vit eru ein grønur stovnur

**Vit ynskja :**
- At tú hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- At tú ert ágrýtin og nýhugsandi
- At tú ert við til at menna tað pedagogiska arbeiði
- At tú kannst taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- At tú sært møguleikar og avbjóðingar fram um forðingar

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Morið A. O. Gardy, leiðara, á tlf. 470134 / 230134 ella Marin í Niðristovu Durhuus, varaleiðara, á tlf. 470138 / 230138.

**Umsóknir**
saman við avriti av prógvum og viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. juli kl. 12.00 og sendast til:

Gjáarlon
Hornavegur 16
FO-350 Vestmanna
Umsóknir skulu merkjast: »Námsfrøðingar«

Um ongin námsfrøðingur søkir, verða hjálparfólk fyribils sett í størvini.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Setanarsamrøður verða í viku 28.

**DAGSTOVNURIN GJÁARLON**


**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

**ADC-Heilsølan** spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820